gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Ómentaður mentamálaráðharri

Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður, er enn einaferð í eldinum við einum trúverdigheitsspurningi, har hann beinleiðis sigur skúlafólki við drúgvum royndum í skúlans tænastu, at tað tey siga ikki er satt. Og so sigur hann eisini fyri aðru ferð innan stutta tíð, at Sosialurin sigur ósatt.

Fyrru ferð var fyri einum hálvum ári síðani, tá landsstýrismaðurin av sínum eintingum avsegði grundlógardagin. Í kjalarvørrinum av hesum óvanliga politiska stigi kallaði hann løgmann ein danskan leigusvein.

Hesa søguna handfóru vit hendan dagin, og varð hon forsíðusøgan. Og her er bakgrundin fyri, hví vit júst valdu hesa søguna:

Tá ein redaktión hevur úttalilsi frá einum landsstýrismanni, sum kallar ein sjálvstýrisløgmann fyri ein danskan leigusvein, og hesi úttalilsi enntá finnast á bandi, so er hetta ein viðkomandi søga.

At onkur kann fáa hetta til eina flokspolitiska herferð, fáa vit einki gjørt við, men sum journalistisk søga er hetta tilfar, sum ikki kann tigast burtur.

Sosialurin hevði onga grund til at trúgva, at Tórbjørn Jacobsen ikki var maður fyri sín hatt og stóð við tað, hann segði.

Men stutt eftir at blaðið varð komið á gøtuna, kom eitt tíðindaskriv frá Tórbjørni, har hann avsannaði alt, sum stóð í blaðnum. Akkurát á sama hátt sum nú við leiðsluni í Vestmanna skúla.

Tá trein hann fyrstu ferð fram á pall og segði, at tað sum hann hevði sagt, tað hevði hann ikki sagt. Í dag stendur hann fram aftur og sigur, at tað sum leiðslan í Vestmanna Skúla og Sosialurin siga um fundin við Tórbjørn, er ósætt. Enntá fyri opnari mikrofon á sama hátt sum fyrstu ferð, tá alt Føroya Fólk fekk at hoyra við egnum oyrum, at tað ikki altíð er satt, tað sum Tórbjørn førir fram. Og so plaga vit at siga, at fáur lýgur meira enn helvtina.

At blanda flokspolitikk upp í, tá ein hevur rópt seg fastan, tað er ikki annað enn ein ómansligur máti at sleppa sær undan ábyrgd og at vaska síni egnu mistøk upp í onnur.

Vanligur fólkasiður er sjálvur lunnurin undir allari heimsins mentan, og dugir mentamálaráðharrin ikki vanligan fólkasið, so er hann ómentaður, og tá hava Høgni og Anfinn ein sváran trupulleika at dragast við.

Sleppur landsstýrismaðurin í menta- og skúlamálum at lúgva fyri opnari mikrofon fyri øllum Føroya Fólki, hvussu skulu vit tá hava at okkara børnum, tá tey siga ósatt. Vit hava her ein trupulleika, sum hevur við sjálva sálina í okkara samfelag at gera.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Grindadráp

**Heri Mohr**



Fyri stuttari tíð síðani hevði SvF tey tíðindi, at landsstýrismaðurin, sum hevur føroyska mentan í hondum, hevði keypt ein málning eftir Mikinesmálaran fyri – minnist meg rætt – eina kvart millión, og um vit leggja MVG afturat prísinum, so hevur málningurin kostað 312.500 krónur.

Vit sóu og hoyrdu, at talan er um eina mynd við grindadrápsmotivi, og skemtiliga varð sagt, at málningurin kanska skal hanga á einum ávísum veggi í mentamálastýrinum undir liðini á einum kollveltingarmanni og idoli úr Argentina.

Annað fingu vit ikki at vita.

Nú er tað soleiðis, at okkara navnframi listamaður Mikines málaði fleiri málningar við motivi frá grindadrápi. Í bókini »S. Joensen-Mikines, Færøernes maler, hans kunst og miljø«, sum Ernst Mentze skrivaði og gav út í 1973, framgongur, at longu í 1932 »fuldførte han et første mindre arbejde med dette motiv«, sum tó ikki hevur nakað tilknýti til teir stóru grindadrápsmálningarnar málaðir í 1942 í St. Kongensgade í Keypmannahavn: »Det første af disse billeder blev erhvervet af grosserer Jacob Dahl, i hvis eje det var til Maj 1961, da det ved auktion blev erhvervet af »Det store nordiske Telegrafselskab«, der i anledning af åbningen af den ny kabelforbindelse mellem Skotland og Færøerne – hvorved Færøerne fik sin første telefonforbindelse til Vesteuropa – skænkede Mikines-billedet til det færøske Lagting. Det skete den 23. januar 1962. I dag smykker billedet mødesalen i tinghuset i Tórshavn. Et andet arbejde med samme motiv blev erhvervet af skuespillerinden Else Højgaard«. – Hon livdi eins og S. Joensen-Mikines 1906-1979. – »Af de nævnte to arbejder er det første (på tinghuset) så avgjort det værdifuldeste – et betagende kunstværk, bygget op med en kraftfuld rytme i kompositionen og udstrålende en djævelsk råhed og barbarisme…«

Í bókini MIKINES, sum Emil Thomsen/Bárður Jákupsson góvu út í 1990, síggja vit (Hendingarøð 235/235), at grindadrápsmálningar koma fyri í 1942, 1944, 1945, 1946, 1956, 1958 og 1959. Ernst Mentze vil vera við, at málningurin 1956 »i skønhed og dramatik kommer meget nær de tidligere med samme motiv fra 1942«.

Í stuttum hava vit her fingið at vita eitt sindur um tveir av grindadrápsmálningunum hjá Mikinesi, og hvussu tað bar til, at teir gjørdust almenn ogn.

Nú er so eitt triðja »dráp« komið fyri ein dag, og løgið er tað, at okkara fjølmiðlar ikki hava víst hesum eitt sindur óvanliga keypi áhuga, tí tað átti ikki at verið meira enn rímiligt og natúrligt, at vit skattaborgarar, sum hava goldið metstóra upphædd fyri málningin, fingu eitt og annað at vita um listaverkið og soleiðis givið tí sjálvsagdan og óivað áhugaerdan identiteg:

*– Nær er myndin málað?*
*– Hvussu stórur er málningurin?*
*– Hvør hevur átt málningin?*
*– Á hvørjari uppboðssølu varð hann keyptur?*
*– Var áhugin stórur á uppboðssøluni?*
*– O.s.fr.*

Kanska rætti viðkomandi (keyparin?) kundi greitt okkum eitt sindur frá hesum.

# Fagnaðardagur á Selatrað

TÍÐINDASKRIV
*KFUM-skótarnar*

2. hvítusunnudag skipa KFUM-skótarnir fyri Fagnaðardegi á Skótadeplinum á Selatrað, har skótafamiljur og øll áhugað eru vælkomin.

Fagnaðardagurin hevur verið eitt fast tiltak á skránni hjá KFUM-skótunum seinastu árini. Endamálið er at fáa til vega pening til íløgur á deplinum; men eisini at skipa fyri einum degi fyri børn, foreldur og onnur áhugaði, har tey síggja teir góðu møguleikar, sum KFUM-skótarnir kunnu bjóða á Skótadeplinum á Selatrað.

Á skránni verða fleiri tiltøk, sum skótabólkarnir kring landið skipa fyri. T.d. verður fiskibrunnur, forðarenning, primitiv matgerð, skjótibreyt, klintriveggur, 21-spæl, tombola, kondibingo og kaffisøla.

Um hvítusunnuna er eisini LPK, sum er landspatrúljukappingin hjá KFUM-skótunum, so tey vitjandi fáa eisini møguleika at verða við til at heiðra vinnandi patrúljuna á LPK-2001.

Fagnaðardagurin verður 4. juni – 2. hvítusunnudag kl. 13.00 – 17.00.

Skipað verður fyri bátasambandi millum Hósvík og Selatrað, so ikki er neyðugt at koyra so langt hjá teimum, sum koma út Havnini.

Vit vóna at fleiri vilja unna sær ein góðan dag á Selatrað 2. hvítusunnudag – við allari familjuni.




**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


gult9 cyan9 magenta9 svart9



## VIÐMERKINGAR

# Kyoto sáttmálin - forðingar ella møguleikar

**Eyðun Elttør,**
*landsstýrismann í olju- og umhvørvismálum*



Herfyri bóru bæði føroyskir og altjóða fjølmiðlar tíðindi um, at landsstýrið hevur biðið Danmark tikið fyrivarni fyri Føroyum í sambandi við donsku staðfestingina av Kyoto sáttmálanum um útleiðingar av vakstrarhúsgassum.

Havt hevur verið á lofti, at við oljuvinnuni fyri durum, og harvið eini hækking av CO2 útlátinum, ynskja vit ikki at binda okkum at skerja útlátið av vakstrarhúsgassum. Tískil verða vit sett í bás við USA, sum hevur tikið endaliga avgerð um ikki at seta Kyoto sáttmálan í gildi. Hetta meti eg vera eina óhepna samanbering, tí enn hava Føroyar bara tikið eina fyribils støðu.

### Sáttmálin um veðurlagsbroytingar

Hóast flestu fólk eru greið yvir, at størri og minni broytingar í verðurlagnum koma fyri, er ein stórur partur av heimsins veðurlagsserfrøðingum í dag tó á einum máli um, at vaksandi útlátið av vakstrarhúsgassum, serliga CO2, fer at føra til varandi veðurlagsbroytingar.

Í viðurkenning av hesi hóttan var Rio de Janeiro í 1992 vertur fyri eini ráðstevnu, hvørs ítøkiliga úrslit m.a. var ein sáttmáli um verðurlagsbroytingar – tann sonevnda klimakonventiónin, sum varð undirskrivað av meir enn 150 londum. Endamálið er at skapa eina legu fyri útleiðingum av vakstrahúsgassum, sum tryggjar, at ávirkanin á veðurlagið ikki gerst vandamikil fyri okkum ella komandi ættarlið. Sáttmálin kom alment í gildi í 1994, umleið eitt ár eftir at Føroya Løgting hevði samtykt, at sáttmálin eisini skuldi galda fyri Føroyar.

Sáttmálin áleggur m.a. pørtunum at fáa til vega hagtøl yvir útlát av CO2 og øðrum vakstrarhúsgassum. Í Føroyum hava vit onki yvirlit yvir hesar útleiðingar, bert nakrar fáar uppgerðir, sum í stóran mun eru grundaðar á innflutningin av brennievnum, og sum ikki eru nøktandi, tá ið vit skulu gera metingar av, í hvøn mun vit kunnu skerja okkara útleiðingar av vakstrarhúsgassum.

### Kyoto sáttmálin

Tað gjørdist skjótt greitt, at málini í sáttmálanum um veðurlagsbroytingar, sum greitt er frá omanfyri, ikki vóru nóg víttfevnandi. Á eini ráðstevnu í Kyoto í 1997 varð ein ískoytissáttmáli undirskrivaður, sum bindur partarnar at skerja teirra útleiðingar av vakstrarhúsgassum við í meðal 5% grundað á útlátið í 1990. Málið skal náast í tíðarskeiðnum 2008-2012.

Danmark hevur vegna ríkið bundið seg at lækka útlátið við 8%. Um fyrivarni ikki verður tikið fyri Føroyum í sambandi við donsku ígildissetanina av Kyotosáttmálanum í 2002, er bindingin eisini galdandi fyri Føroyar.

Í hesum sambandi kann nevnast, at Kyoto sáttmálin loyvir nøkrum londum at hækka teirra útlát, t.d. kunnu Noreg, Svøríki og Ísland hækka útlátið við ávíkavist 1%, 4% og 10%.

Lat meg gera greitt, at tað ikki er vantandi føroysk umhvørvisábyrgd, sum forðar okkum í at staðfesta Kyoto sáttmálan. Áðrenn vit binda okkum til henda sáttmálan, eiga vit at fáa eitt haldgott yvirlit yvir útleiðingarnar av vakstrarhúsgassum í Føroyum seinnu árini. Ein náttúrligur partur av hesum arbeiði er eisini at meta um, hvussu ein møgulig oljuvinna fer at ávirka CO2 útlátið í Føroyum.

Ídnaðurin hevur seinnu árini sett nógva orku av til at menna tøkni, sum kann minka um útlátið av vakstrarhúsgassum, og framstig eru gjørd á økinum. Eisini oljuvinnan arbeiðir framhaldandi fyri at minka um CO2 útlátið í samband við oljuframleiðslu. Í hesum sambandi er vert at nevna, at oljumálastýrið leggur dent á, at oljuvinnan brúkar framkomna og umhvørvisvinarliga tøkni til virksemið á landgrunninum.

### Føroyar og Kyoto

Eg meti, at grundarlagið í løtuni er ov veikt at taka støðu til, hvørt Kyoto sáttmálin skal setast í gildi í Føroyum. Vit mugu fyrst hyggja nærri at, hvussu ásetingarnar í Kyoto sáttmálanum kunnu sameinast við ætlanirnar um eina føroyska oljuframleiðslu.

Í løtuni verður kannað, hvussu arbeiðið við at fáa til vega hagtøl best kann skipast. Oljumálastýrið hevur verið í samband við útlendskar stovnar fyri at kanna møguleikan fyri ráðgeving um málið. Avgerð verður um stutta tíð tikin um, hvussu henda uppgáva skal leggjast til rættis.

Mín ætlan er eisini at kanna møguleikarnar sum liggja í Kyoto sáttmálanum, t.d. fyri keyp av kvotum og aðrar serligar reglur sum eru galdandi. Vísir tað seg at bindingarnar í sáttmálanum ikki seta nakra veruliga forðing fyri oljuframleiðslu, kunnu vit verða við í globala arbeiðinum at minka um CO2 útlátið, samstundis sum okkara vinna kann mennast.

Okkara størsti trupuleiki í hesum sambandi er, at Føroyar eru eitt lítið land. Tískil vilja einstakar verkætlanir, sum innibera eitt stórt útlát av vakstrarhúsgassum, t.d. oljuframleiðsla, hava eina stóra ávirkan á samlaða útlátið. Tað er neyvan gjørligt at loysa henda trupulleika við at skerja útlátið frá øðrum pørtum av samfelagnum. Tær avmarkingar vit kunnu seta í verk innan t.d. orkuframleiðslu, upphiting av húsum ella ferðslu muna ov lítið sammett við tann vøksturin í útlátinum, sum ein møgulig oljuvinna kann elva til. Í dag nýta vit longu umhvørvisvinarligar orkukeldur, t.d. koma um 40% av okkara streymframleiðslu frá vatnorku. Hesin parturin kann gerst størri, um aðrir orkumøguleikar so sum vind- og alduorka í framtíðini verða tikin í nýtslu í Føroyum.

Ísland hevur ein líknandi trupulleika. Tey hava eitt lutfalsliga lágt útlát av gassum, av tí at ein stórur partur av orkunýtsluni í Íslandi stavar frá umhvørvisvinarligum orkukeldum, so sum jarðarhita. Tískil vilja verkætlanir við stórum útlátum, eins og t.d. okkara oljuvinna, beinanvegin síggjast aftur í hagtølunum sum ein vøkstur - og kunnu sum meginregla ikki setast í verk innan Kyoto sáttmálan. Ísland hevur av hesi orsøk støðugt arbeitt fyri serstøkum reglum fyri lond, sum eru í eini líknandi støðu.

Tá vit hava fingið eitt fullgott yvirlit yvir okkara útlát og hava fingið innlit í møguleikarnar, ið liggja í Kyoto sáttmálanum, herundir hvussu vit kunnu skipa okkara vinnu í framtíðini, verða vit vónandi til reiðar at gerast partur av Kyoto sáttmálanum.

# Góðtaka ikki, at samráðingarrætturin verður skerdur

**Javnaðarflokkurin**

Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið hava heitt á Javnaðarflokkin um at greiða frá støðu floksins til framferðina hjá Fíggjarmálastýrinum í málinum um Teistan og Brimil.

- Javnaðarflokkurin fer á ongan hátt at góðtaka, at samráðingarrætturin verður skerdur ella tikin frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

- Javnaðarflokkurin átalar harðliga, at landsstýrið gjøgnum fútarættin roynir at troka arbeiðsrætt inn á føroyska arbeiðsmarknaðin.

Við at biðja Fútarættin døma í sáttmálatrætuni millum manningarfeløgini og fíggjarmálastýrið, hevur landsstýrið tikið ókreinkiliga samráðingarrættin frá fakfeløgunum og uttan teirra luttøku latið upp í hendurnar á einum ”donskum” dómara einsamøllum at gera av, hvussu fakfelagsviðurskiftini í Føroyum skulu avgerast.

Hetta er enn grovari álop á fakfelagsrørsluna, enn ein Arbeiðsrættur hevði megnað.

Um landsstýrið á henda hátt vil noyða Arbeiðsrættin ígjøgnum, so skal greitt og týðilga sigast frá, at vit í Javnaðarflokkinum fara at gera alt, sum stendur í okkara makt, fyri politiskt at forða samgonguni á slíkan hátt at skerja rættindini hjá løntakarunum á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Bæði Javnaðarflokkurin og fakfeløgini hava víst á møguleikan at skipa ein víðkaðan gerðarrætt at taka sær av trætum, sum í sáttmálaskeiðnum kunnu stinga seg upp millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Vit ásanna, at ein víðkaður gerðarrættur kann vera neyðugur í ávísum førum. Men vit góðtaka als ikki, at arbeiðsgevarar í tíð og ótíð lata rættarskipanini upp í hendur at avgera trætur, sum eiga at loysast við samráðingum millum partarnar.

At eingin sáttmáli enn er gjørdur millum Fíggjarmálastýrið og partar av manningunum á Brimli og Teistanum er bæði synd og skomm, tí sjálvsagt skuldu allar sáttmálasamráðingar verið loknar, áðrenn skipini vóru klár at fara í sigling.

- Javnaðarflokkurin krevur, at Fíggjarmálastýrið beinanvegin tekur málið um Teistan úraftur fútarættinum.

Samstundis heitir Javnaðarflokkurin á manningarfeløgini og Fíggjarmálastýrið um við samráðingum at fáa enda á sáttmálatrætuni, so manning, ferðafólk og vinna sleppa at brúka tann stásiliga Teistan.

# Serskatting av hjúnum

**Flemming Mikkelsen,**
*løgtingsmaður*



**Hóast nógvar atfinningar vóru móti uppskoti Sambandsfloksins um serskatting av hjúnum, so vóru tó nøkur, sum sóu tað skilagóða í uppskotinum og fingu tað samtykt.**

Uppskotið, um serskatting av hjúnum, sum Flemming Mikkelsen, vegna Sambandsflokkin, legði fyri løgtingið, hevur vakt ans bæði fyri og ímóti.

### Atfinningar

Í fyrstu atløgu var tað samgongan, sum ikki kundi semjast um uppskotið, hóast tað var fult í samsvari við teirra egna samgonguskjal.

Síðani gjørdi Javnstøðunevndin vart við seg, og fanst hvassliga at uppskotinum við tí ómotiveraðu yvirskriftini, at her var talan um eina serliga skattalóg fyri giftar menn, og fastlæsing av kvinnum.

Teimum á baki kom Kvinnusamskipan Føroya, sum harliga fanst at ætlanini at geva hjúnum serlig skattarættindi, bara tí tey eru gift.

### Gevur valmøguleikar

Hóast alt hetta negativa, vóru tað onnur, sum sóu nakað positivt í málinum, og sum tordu at gera vart við seg. Hesi søgdu sína hugsan um tær samfelagsbroytingar, fram eru farnar í seinnu helvt av nú farnu øld, eisini innan familjuna, har foreldur, um tey vilja tað ella ikki, eru noydd at vera í vinnu, fyri at klára dagin og vegin.

Hesi mettu, at uppskotið var gott, tí hjún (serliga við børnum), eftir hesum fáa ein valmøguleika, um so er, at fíggjarligir møguleikar eru fyri, at annað av foreldrunum kann vera heima og ansa børnunum.

Nú áliggur tað landsstýrismanninum í skattamálum at tilevna eitt lógaruppskot, sum er í samsvari við uppskotið, sum løgtingið samtykti.